## Meira Ståle í FCK

Í gjár boðaði FC Keypmannahavn frá, at venjarin hjá felagnum, 39 ára gamli Ståle Solbakken, hevur longt sáttmálan við felagið fram til 2011. Norski venjarin hjá FCK hevði tvey ár eftir av verandi sáttmála, men partarnir eru so væl nøgdir við samstarvið, at avtalan teirra millum varð longd við tveimum árum.

- Úrslitini hjá Ståle tala fyri seg sjálvi, og hann hevur eisini víst avgerandi eginleikar á leiðsluøkinum. Eg haldi, at Ståle er eitt av størstu venjaratalentunum í Euopa í løtuni, sigur Flemming Østergaard, nevndarformaður í FCK.



## AaB vann uttan føroyingar

Hvørki Súni Olsen ella Jón Rói Jacobsen vóru við í hópinum, tá ið AaB í gjár spældi í donsku superliguni. Mótstøðuliðið var AC Horsens, og AaB vann ein tryggan sigur. Úrslitið gjørdist 4-1. Súni Olsen hevur drigist við skaða seinastu dagarnar, og hann var tí ikki tøkur, og pláss var ikki fyri Jón Róa í hópinum. Súni Olsen hevur eina fiburspreinging, og tað verður roknað við, at hann verður førur fyri at spæla aftur næstu ferð.

# 8,5 milliónir í veddingarpengum

**Á ársaðalfundi hjá smápartafelagnum Ítróttavedding mikudagin fingu Ítróttasamband Føroya, Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðið sín part av køkuna hjá Danske Spil**

ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*



*Tjóðhild Patursson, forkvinna í Føroya Ungdómsráð, Heðin Mortensen, forseti í Ítróttasambandi Føroya, og Armgarð Weihe, fulltrúi í Mentamálaráðnum, tóku mikudagin ímóti kekkunum frá smápartafelagnum Ítróttavedding*

Tey seinnu árini hevur størsta fíggjarliga íkastið til barna- og ungdómsarbeiði í Føroyum verið tað, ið stavar frá veddingarpengum og umvegis smápartafelagið Ítróttavedding verður lutað út til Ítróttasamband Føroya, Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðið.

Samlaða upphæddin hesa ferð var 8,5 milliónir krónur, og á aðalfundinum í smápartafelagnum Ítróttavedding mikudagin fekk Ítróttasamband Føroya 5,1 millión krónur, og Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðið 1,7 milliónir krónur í part.

Upphæddin, sum verður lutað út, skiftir eitt sindur frá ári til ár, alt eftir hvussu ídnir føroyingar eru at vedda og spæla hjá Danske Spil, og í farna árinum hava teir verið heldur ídnari enn í fjør, tá útlutaða upphæddin var 8,2 milliónir krónur.

### Kemur væl við

– Fyri okkara viðkomandi kemur upphæddin frá veddingarpengunum sera væl við, og hon fer øll beinleiðis til ítróttin. Sersambondini fáa pengarnar eftir einum ávísum býtislykli, og nú Oyggjaleikir eru á Rhodos í summar, er hetta kærkomið íkast hjá fleiri ítróttargreinum, sigur Heðin Mortensen, forseti í Ítróttasambandi Føroya.

Tað sama sigur Armgarð Weihe, fulltrúi í Mentamálaráðnum.

– Vit hava jú ábyrgd av, at karmarnir fyri virksemi hjá børnum og ungum eru í lagi, og sum vanligt verða pengarnar brúktir til mong og ymisk endamál, so teir koma so mongum til góðar sum gjørligt, sigur hon.

Tjóðhild Patursson, forkvinna í Føroya Ungdómsráð, sigur veddingarpengarnar hava ótrúliga nógv at siga fyri arbeiði hjá teirra limafeløgum.

– Hetta heldur so at siga øllum arbeiðinum uppi, og hjá fleiri av okkara limafeløgum er hetta næstan eina inntøka, tey hava, sigur hon.

### Nýggj í nevndini

Á aðalfundinum mikudagin kunngjørdi Jan Vang, sum hevur verið nevndarlimur í fleiri ár, at hann legði frá sær, og Sára Zachariasardóttir frá Føroya Ungdómsráð var vald sum nýggjur nevndarlimur.

Nevndin í smápartafelagnum Ítróttavedding sær nú soleiðis út, at Tórfinn Højgaard er formaður, Sigmund Poulsen næstformaður, og nevndarlimir eru Heðin Mortensen, Sára Zachariasardóttir, Søren Pram Sørensen, Hans Petur Joensen og Petur Elias Petersen, sum eisini er stjóri.

## Gloymdu Slavisa

**Skála kann vænta sær bót, tí teir gloymdu at skriva spælara á dómaraseðilin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá 81 minuttir vóru farnir av dystinum í Gundadali framdi Skála sína seinnu útskifting. Inn kom Slavisa Kaplanovic, men eingin var varugur við, at spælarin als ikki stóð á dómaraseðlinum. Snøgt sagt, so var hann gloymdur, tá seðilin varð skrivaður, og linjuverjin varnaðist ikki mistakið, tá spælarin varð sendir inn.

Tað er sjálvandi ikki eftir forskriftunum, tá spælari ikki stendur á dómaraseðlinum, og tí kann Skála rokna við, at málið verður tikið upp á aganevndini. Antin tí nevndin sjálv velur at viðgera málið, ella um B36 sendir inn kæru.

Men tað verður tó ikki so, at Skála verður dømt at tapa dystin kortini. Siðvenjan á hesum økinum varð broytt eftir ein famøsan dómaraseðil hjá MB fyri góðum 20 árum síðani. Setningurin hevur eftir tann tilburðin verið, at ein dystur ikki kann tapast vegna skrivimistak. Tað varð eisini staðfest í fyrraárið, tá Royn kærdi dyst móti B71. Niðurstøðan hjá bæði Kappingarnevnd og Dómsnevnd varð tað ferðina, at B71 skuldi revsast við bót.

# Áslakur vann sprintið

**Føroya Triathlon Felag skipaði í sunnudagin fyri Sprint triathlon, sum eisini var ein fyrireikingarkapping til Oyggjaleikirnar á Rhodos**

TRIATHLON
*tíðindaskriv*

Kappingin var í Havn, og kappast varð soleiðis, at 750 metrar skuldu svimjast, 20 kilometrar skuldu súkklast, og at enda varð runnið 5 kilometrar.

Fyrst var svomið í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja, skuldi íðkarin skunda sær út á súkkluna, og súkkla frá Svimjihøllini eftir Norðara Ringvegi, fram við Strond til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C. Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins. Her var skift til renning, og runnið var frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Teinurin var runnin 6 ferðir.

Ikki óvantað var Súsanna Skylv fyrst úr svimjihylinum. Men hon brúkti langa tíð um at skifta í súkkluklæðini, so hon og Evald Rasmussen fóru næstan samtíðis á súkklurnar. Skjótt var eisini, at Evald í undanbrekkuni fór fram um Súsonnu. Tá vent varð fyrstu ferð við Skansan, var Andrass Joensen í hølunum á teimum, og á heimvegnum fór hann fram um bæði. Áslakur Nesá, sum var seinastur úr hylinum, súkklaði so skjótt, at hann eftir stuttari tíð bara hevði Andrass at súkkla eftir.

Tá skift var til renning, var Andrass fyrstur avstað, og beint aftanfyri hann kom Áslakur. Tá teir vóru komnir hálvt fyrsta renniumfar, komu Evald og Súsanna inn til skiftið súkkling-renning. Evald var fyrri úti á renni-leiðini, men Súsanna kom í fylgi við Andrassi og Áslaki, sum nú vóru eitt heilt renniumfar frammanfyri. Øll trí yvirhálaðu Evald, og í dystinum millum Andrass og Áslak, var Áslak tann stinnari og kom á mál ein minutt framman fyri Andrass.

Kappingin var, sum fyrr sagt, ein liður í fyrireikingunum til Oyggjaleikirnar. Triathloníðkararnir hava undanfarna mánaðin verið eitt vikuskifti á venjingarlegu á Svangaskarði, avgreitt úttøkikappingina, og leygardagin 26. mai fer alt oyggjaleikalandsliðið at svimja styttra teinin í Nólsoyarsvimjingini. 3. juni fer landsliðið til eina stóra triathlonkapping í Haderslev. Teinurin har er 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning. Svomið verður á sjónum og tí er neyðugt at brúka vátdrakt. Venjingarnar til hetta gera íðkararnir komandi dagarnar í Sandagerði og fram við Argjalandinum.

**Triathlon, úrslit**

Menn:

| Navn. Nr. | Svimjing | Skift 1 | Súkkling | Skift 2 | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Aslak Nesá | 0.13.58 | 0.01.43 | 0.31.01 | 0.00.25 | 0.22.35 | 1.09.42 |
| 2. Andrass Joensen | 0.12.45 | 0.01.30 | 0.31.53 | 0.00.33 | 0.24.02 | 1.10.43 |
| 3. Evald Rasmussen | 0.12.20 | 0.01.31 | 035.54 | 0.00.25 | 0.29.40 | 1.19.26 |

Kvinnur:

| Navn. Nr. | Svimjing | Skift 1 | Súkkling | Skift 2 | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Súsanna Skylv | 0.10.47 | 0.02.55 | 0.36.34 | 0.00.24 | 0.24.40 | 1.15.20 |